# P/F Vágatunnilin

**P/F-Skrás.nr.: 2809**

## Ársfrásøgn

## 1. januar - 31. desember 2014

| **FRUMRIT** |
| --- |

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann / .

_________________________________

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2014** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 12 |
| Fíggjarstøða | 13 |
| Pengastreymsuppgerð | 15 |
| Notur | 16 |

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014 hjá P/F Vágatunnilin.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2014 og av úrslitinum av virksemi og pengastreymi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 31. mars 2015

**Stjórn**

Uni Danielsen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Jens Kári Vilhelm<br>nevndarformaður | Dánial Tummas Thomsen<br>næstformaður | Marita Súsanna Hentze<br>nevndarlimur |
| Mathea Elisabeth Hilduberg<br>nevndarlimur | | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigaran í P/F Vágatunnilin**

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vágatunnilin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, pengastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ein ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2014 og av úrslitinum av virksemi og pengastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2014 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sambært ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað sum ískoyti til grannskoðanina av ársroknskapinum. Útfrá hesum grundarlagi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Tórshavn, tann 31. mars 2015

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vágatunnilin<br>Hoyvíksvegur 65<br>FO-100 Tórshavn | |
| | Telefon: | 350200 |
| | Telefaks: | 350201 |
| | Heimasíða: | www.tunnil.fo |
| | Teldupostur: | tunnil@tunnil.fo |
| | P/F-skrás.nr.: | 2809 |
| | V-tal: | 485.209 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Jens Kári Vilhelm, Hoyvík, nevndarformaður<br>Dánial Tummas Thomsen, Sandavágur, næstformaður<br>Marita Súsanna Hentze, Argir, nevndarlimur<br>Mathea Elisabeth Hilduberg, Tórshavn, nevndarlimur | |
| **Stjórn** | Uni Danielsen, stjóri | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Hoyvíksvegur 5, Postboks 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Høvuðs- og lyklatøl

| | 2014<br>t.kr. | 2013<br>t.kr. | 2012<br>t.kr. | 2011<br>t.kr. | 2010<br>t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | | | | | |
| Nettosøla | 18.914 | 21.170 | 20.737 | 22.248 | 21.127 |
| Bruttoúrslit | 16.153 | 18.395 | 17.007 | 19.413 | 18.562 |
| Rakstrarúrslit | 4.567 | 7.356 | 1.775 | 4.040 | 2.883 |
| Fíggjarligir postar, netto | -82 | -546 | -1.169 | -1.821 | -2.382 |
| Ársúrslit | 3.678 | 5.567 | 497 | 1.819 | 411 |
| **Fíggjarstøða:** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 189.776 | 191.380 | 195.496 | 207.099 | 216.430 |
| Eginogn | 175.765 | 172.088 | 166.521 | 166.024 | 164.205 |
| **Pengastreymar:** | | | | | |
| Rakstur | 9.965 | 15.070 | 14.272 | 13.314 | 10.063 |
| Íløgur | -87 | -2.082 | -16 | -783 | -564 |
| Fígging | -4.402 | -13.107 | -13.109 | -11.773 | -11.454 |
| **Starvsfólk:** | | | | | |
| Starvsfólk í miðal | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| **Lyklatøl í %: *)** | | | | | |
| Bruttoavkast | 85,4 | 86,9 | 82,0 | 87,3 | 87,9 |
| Rakstraravkast | 24,1 | 34,7 | 8,6 | 18,2 | 13,6 |
| Eginognarpartur | 92,6 | 89,9 | 85,2 | 80,2 | 75,9 |
| Renting av eginogn | 2,1 | 3,3 | 0,3 | 1,1 | 0,3 |

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2010". Lyklatøl við negativum virði verða ikki víst. Lyklatølini eru allýst undir nýttum roknskaparhátti.

## Leiðslufrágreiðing

### Virksemi
Endamál felagsins er at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur og fast samband um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið. Felagsins virksemi í farna ári hevur í høvuðsheitum verið at reka tunnilin undir Vestmannasundi og annars at gera neyðugar ábøtur. Undirsjóvartunnilin lat upp fyri almennari ferðslu 10. desember 2002.

### Lógargrundarlag
Felagið varð stovnað við 20,3 mió.kr. í løgujáttan á fíggjarløgtingslógini og eykajáttanarlógini fyri 1998. Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan 160,3 mió.kr., krøv til felagið, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning eru ásett í Ll. nr. 6 frá 08.02.2000 (Anleggslógin) um "fast samband um Vestmannasund.

### Gongdin í virksemi og fíggjarligum viðurskiftum
Ársins nettosøla er 18.914 t.kr. ímóti 21.170 t.kr. seinasta ár. Úrslitið eftir skatt er 4.190 t.kr. ímóti 5.567 t.kr. seinasta ár.

### Tøkur peningur
Tøki peningur felagsins er øktur 5.476 t.kr., úr 3.596 í 2013 til 9.072 t.kr. í 2014.

### Framtíðarútlit
Mett verður, at felagið framhaldandi fer at hava eitt positivt gjaldføri í 2015.

### Hendingar eftir roknskaparlok
Eftir roknskaparlok er onki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársfrásøgn felagsins.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri P/F Vágatunnilin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B. Harumframt hevur felagið valt at fylgja einstøkum ásetingum fyri feløg í flokki C.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil tøl. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagið, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið, sum ognin ella skyldan varar. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligar avdráttir, umframt ískoyti/frádrátt av samlaðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði. Á henda hátt verða kurstap og kursvinningur býtt yvir tíðarskeiðið, sum ognin ella skyldan varar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

## Nýttur roknskaparháttur

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Støðisogn og aðrar ikki-peningaligar ognir, ið ikki verða mettar sum íløguogn og eru keyptar í fremmandum gjaldoyra, verða virðisásettar til kursin á handilsdegnum.

## Rakstrarroknskapur

**Nettosøla**

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

**Aðrar rakstrarinntøkur og rakstrarkostnaðir**

Aðrar rakstrarinntøkur og rakstrarkostnaðir umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum vinning og tap við sølu av immateriellari og materiellari støðisogn.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, leigu, tap av áognarum.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

**Skattur av ársins úrsliti**

Skatturin í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum og innroknaður beinleiðis á eginognina við tí parti, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognina.

## Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

## Nýttur roknskaparháttur

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar hjá ognunum:

| | |
|---|---|
| Vegir og tunnil | 10-14 ár |
| Tøknibúnaður | 3-5 ár |
| Rakstrartól | 5 ár |
| Innbúgv | 10 ár |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verða uppgjørd sum munurin millum søluprís og roknskaparliga virðið á søludegnum, frádrigið sølukostnað. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrar-roknskapin undir avskrivingum.

**Niðurskriving av støðisogn**

Roknskaparliga virðið á bæði immateriellari og materiellari støðisogn verður hvørt ár mett við atliti at ábendingum um virðislækkingar umframt ársins avskrivingar.

Eru ábendingar um virðislækking, verður ein niðurskrivingarkanning gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurútveganarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurútveganarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettoinntøkum frá at nýta ognina ella ognarbólkin.

**Vørugoymsla**

Vørur á goymslu verða virðisásettar til kostprís grunda á roknaðan miðalprís. Er nettorealisatiónsvirðið av goymsluni lægri enn kostprísurin, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum, rávørum og øðrum hjálpartilfari verður roknað sum keypsvirði, umframt flutningsgjald.

Nettorealisatiónsvirðið fyri vørugoymslur verður uppgjørt sum søluprísur, frádrigið kostnað til liðugtgerð og kostnað til at gjøgnumføra søluna. Nettorealisatiónsvirðið verður ásett við atliti at sølubæri, ókuransi og gongdini á væntaðum søluprísi.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárnum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

### Skuld

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Í fíggjarligum skyldum verður eisini innroknað tann kapitaliseraða restleasingskyldan av fíggjarligum leasingavtalum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

### Tíðaravmarkingar

Í tíðaravmarkingum undir skuld verða móttikin gjøld fyri inntøkur, sum viðvíkja komandi roknskaparárum, innroknað.

## Gjaldførisfrágreiðing

Gjaldførisfrágreiðingin vísir gjaldførisávirkanina frá rakstri, íløgum og fígging fyri roknskaparárið, broytingar í tøkum peningi, umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

## Nýttur roknskaparháttur

**Pengastreymur frá rakstri**

Peningastreymur frá rakstri verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað við ikki kontantum rakstrarpostum, broytingum í rakstrarfígging og goldnum partafelagsskatti.

**Pengastreymur frá íløgum**

Peningastreymur frá íløgum eru gjøld sum stava frá, keyp og sølu av fyritøkum og støðisognum.

**Pengastreymur frá fígging**

Peningastreymur frá fígging er broytingar í støðd ella samanseting á partapeningi og kostnaðir í hesum sambandi. Harumframt er peningastreymurin lántøka, avdráttir av rentuberandi skuld, broyting í ábyrgdarlánum og útgoldið vinningsbýti til eigararnar.

**Peningur**

Peningur er tøkur peningur.

## Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2010".

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

**Bruttoavkast**

$$\frac{\text{Bruttoúrslit x 100}}{\text{Nettosøla}}$$

**Rakstraravkast (EBIT-avkast)**

$$\frac{\text{Rakstrarúrslit (EBIT) x 100}}{\text{Nettosøla}}$$

**Eginognarpartur**

$$\frac{\text{Eginogn uttan minnilutaáhugamál ultimo x 100}}{\text{Skyldur tilsamans ultimo}}$$

**Úrslit***

Ársúrslit, frádrigið partin hjá minnilutaáhugamálum

**Renting av eginogn**

$$\frac{\text{Úrslit* x 100}}{\text{Eginogn í miðal uttan minnilutaáhugamál}}$$

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2014<br>kr. | 2013<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | Nettosøla | 18.914.018 | 21.170.164 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 2.460.882 | 2.509.973 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -5.222.252 | -5.285.513 |
| | **Bruttoúrslit** | **16.152.648** | **18.394.624** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -3.557.861 | -3.587.291 |
| | Av og niðurskrivingar av materiellari støðisogn | -7.403.171 | -7.450.939 |
| | Niðurskriving av goymslu av kubbum | -624.245 | 0 |
| | **Rakstrarúrslit** | **4.567.371** | **7.356.394** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 16.299 | 82.288 |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -98.445 | -627.972 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **4.485.225** | **6.810.710** |
| 2 | Skattur av ársúrsliti | -807.341 | -1.243.748 |
| | **Ársúrslit** | **3.677.884** | **5.566.962** |

**Uppskot til býti av ársúrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 3.677.884 | 5.566.962 |
| **Býtt tilsamans** | **3.677.884** | **5.566.962** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**OGN**

| Nota | | 2014<br>kr. | 2013<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 3 | Vegir og tunnil | 174.631.790 | 181.824.793 |
| 3 | Tøkni- búnaður | 2.227.322 | 2.163.430 |
| 3 | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 514.967 | 701.686 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 177.374.079 | 184.689.909 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **177.374.079** | **184.689.909** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Eykalutir | 244.298 | 244.298 |
| | Kubbar | 0 | 461.295 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 244.298 | 705.593 |
| | Vøru- og tænastuáogn | 2.832.029 | 2.140.196 |
| | Onnur áogn | 253.718 | 249.026 |
| | Áogn tilsamans | 3.085.747 | 2.389.222 |
| | Tøkur peningur | 9.071.746 | 3.595.662 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **12.401.791** | **6.690.477** |
| | **OGN TILSAMANS** | **189.775.870** | **191.380.386** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | 2014 kr. | 2013 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 4 | Felagskapitalur | 160.300.000 | 160.300.000 |
| 5 | Flutt úrslit | 15.465.489 | 11.787.605 |
| | **Eginogn tilsamans** | **175.765.489** | **172.087.605** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| | Avsett til útsettan skatt | 4.035.982 | 3.228.641 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **4.035.982** | **3.228.641** |
| | **Skuld** | | |
| 6 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 230.671 | 4.632.225 |
| | Móttikin undangjøld frá kundum | 8.883.163 | 6.576.326 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 718.084 | 1.917.277 |
| | Trygd og kubbar | 0 | 2.133.400 |
| | Onnur skuld | 142.481 | 804.912 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 9.974.399 | 16.064.140 |
| | **Skuld tilsamans** | **9.974.399** | **16.064.140** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **189.775.870** | **191.380.386** |

## Pengastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2014 kr. | 2013 kr. |
|---|---|---|---|
| | Ársúrslit | 3.677.884 | 5.566.962 |
| 7 | Javningar | 8.292.658 | 9.111.527 |
| 8 | Broyting í rakstrarpeningi | -1.923.418 | 937.182 |
| | Pengastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar | 10.047.124 | 15.615.671 |
| | Rentuinngjaldingar og líknandi | 16.299 | 82.288 |
| | Rentuútgjaldingar og líknandi | -98.445 | -627.972 |
| | Pengastreymur frá vanligum rakstri | 9.964.978 | 15.069.987 |
| | **Pengastreymar frá rakstri** | **9.964.978** | **15.069.987** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -87.340 | -2.321.740 |
| | Søla av materiellari støðisogn | 0 | 239.698 |
| | **Pengastreymar frá íløgum** | **-87.340** | **-2.082.042** |
| | Broyting í langfreistaðari skuld | -4.401.554 | -13.106.628 |
| | **Pengastreymar frá fígging** | **-4.401.554** | **-13.106.628** |
| | **Broyting í tøkum peningi** | **5.476.084** | **-118.683** |
| | Tøkur peningur primo | 3.595.662 | 3.714.345 |
| | **Tøkur peningur ultimo** | **9.071.746** | **3.595.662** |

| | | 2014 kr. | 2013 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Tøkur peningur** | | |
| | Tøkur peningur | 9.071.746 | 3.595.662 |
| | **Tøkur peningur ultimo** | **9.071.746** | **3.595.662** |

# Notur

| | 2014<br>kr. | 2013<br>kr. |
|---|---|---|

## 1. Starvsfólkakostnaðir

| | 2014 kr. | 2013 kr. |
|---|---|---|
| Lønir | 3.438.050 | 3.200.004 |
| Eftirlønir | 0 | 272.030 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 119.811 | 115.257 |
| | **3.557.861** | **3.587.291** |
| Starvsfólk í miðal | 8 | 8 |

## 2. Skattur av ársúrsliti

| | 2014 kr. | 2013 kr. |
|---|---|---|
| Broyting í útsettum skatti | 807.341 | 1.243.748 |
| | **807.341** | **1.243.748** |

## 3. Materiell støðisogn

| | **Vegir og tunnil kr.** | **Tøkni-búnaður kr.** | **Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv kr.** |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 301.609.460 | 9.143.868 | 1.762.811 |
| Tilgongd | 0 | 87.340 | 0 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **301.609.460** | **9.231.208** | **1.762.811** |
| Av- og niðurskrivingar primo | 119.784.666 | 6.980.438 | 1.189.969 |
| Avskrivingar í árinum | 7.193.004 | 23.448 | 57.875 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **126.977.670** | **7.003.886** | **1.247.844** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **174.631.790** | **2.227.322** | **514.967** |

## 4. Felagskapitalur

| | 31/12 2014 kr. | 31/12 2013 kr. |
|---|---|---|
| Felagskapitalur primo | 160.300.000 | 160.300.000 |
| | **160.300.000** | **160.300.000** |

| | 31/12 2014<br>kr. | 31/12 2013<br>kr. |
|---|---|---|
| **5. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit primo | 11.787.605 | 6.220.643 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 3.677.884 | 5.566.962 |
| | **15.465.489** | **11.787.605** |

**6. Skyldur**

| | **Avdráttir fyrsta árið kr.** | **Restskuld eftir 5 ár kr.** | **Skuld tilsamans 31/12 2014 kr.** | **Skuld tilsamans 31/12 2013 kr.** |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til peningastovnar | 230.671 | 0 | 230.671 | 4.632.225 |
| | **230.671** | **0** | **230.671** | **4.632.225** |

´

| | 2014<br>kr. | 2013<br>kr. |
|---|---|---|
| **7. Javningar** | | |
| Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | 7.403.171 | 7.322.095 |
| Aðrar fíggjarligar inntøkur | -16.299 | -82.288 |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 98.445 | 627.972 |
| Skattur av ársúrsliti | 807.341 | 1.243.748 |
| | **8.292.658** | **9.111.527** |
| **8. Broyting í rakstrarpeningi** | | |
| Broyting í vørugoymslum | 461.295 | -386 |
| Broyting í áogn | -696.525 | -1.242.265 |
| Broyting í vøruskuld og aðrari skuld | -1.688.188 | 2.179.833 |
| | **-1.923.418** | **937.182** |